ítróttur

Nr. 51 • leygardagur • 13. mars 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Tyngstu fetini eru eftir

Fyrsta brakið í endaspurtinum verður á Hálsi, har Neistin tekur ímóti StÍF

Seinastu fýra umførini fara øll at innihalda innanhýsis dystir millum oddaliðini

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Tað er helst sagt alt ov ofta í ár, at eitt lið er úti av oddastríðnum, uttan at tað so kortini hevur verið tað. Neistin, VÍF og StÍF hava øll trý verið dømd »over and out« í fleiri umførum, men hvørja ferð hava tey kortini megnað at vent gongdini. Fyrst og fremst við at vinna egnar dystir, men samstundis við at Kyndil hevur sett stig til, soleiðis at teir ikki hava megnað at skrætt seg veruliga leysar.

Armbandið skal av

Tí er støðan framvegis – nú bara fýra umfør eru eftir – at øll hesi fýra liðini hava ein veruligan møguleika at vinna gullmerkini, og enntá er tað soleiðis, at tað bert eru strandingar, sum ikki heilt sjálvir kunnu gera av, hvussu lagnan verður.

Tí eru teir sjálvandi eisini liðið, sum ringast tolir nakrar stigamiss seinastu umførini, og fyrsta royndin hjá teimum verður nú sunnudagin, tá teir vitja hjá Neistanum. Júst eftir dystin móti Neistanum herfyri varð sagt, at meistaraheitið endaði í Havn, men tað hava hvørki strandingar ella vestmenningar verið samdir í síðani, samstundis sum bæði Neistin og Kyndil hava gjørt sítt til, at spenningurin á ongan hátt er horvin.

Og hjá Neistanum er tað nú eisini álvara. Seinasta vikuskiftið høvdu teir møguleikan at vinna seg fram um Kyndil við betri málmuni, men teir taptu greitt fyri kollfirðingum, og nú eru ráðini so ikki til fleiri svipsarar av hasum slagnum. Sambært liðskiparanum hjá Neistanum, so vóru ov nógvir blindir passasjerar við á teirri ferðini, og so er spurningurin, hvørt prikkutu armbondini eru tikin av hesaferð.

Vaknar Kyndil

Eisini í Kyndli er spenningurin stórur undan vikuskiftinum. Mikudagin varð staðfest, at liðið seinastu fýra umførini skal hava nýtt venjarapar, og so er spurningurin, hvat hesir megna at tilføra liðnum.

Roknast kann við, at tað serliga er á sálarliga økinum, at nøkur broyting kann fremjast, og tá H71 er mótstøðuliðið, er einki at ivast í, at tað júst er hetta, sum arbeiðast skal við.

Á pappírinum er nevnliga eingin sum helst ivi um, at Kyndilsliðið er væl betri enn tað, hjá hoyvíkingunum, men kortini hevur H71 fleiri ferðir í ár ikki bara arga, men veruliga gjørt fortreð við Kyndil. Tað hava teir grønu kanska framvegis ráð til, men tað betrar so ikki um útgangsstøðið, og tí er einki at ivast í, at teir nú fara eftir sigrinum, og at tað hesaferð er meira álvari í royndunum, enn tað áður hevur verið.

Seinasti dysturin er í Hoyvíkarhøllini, har VÍF vitjar KÍF. Vestmenningar hava veruliga fingið ferð á seinastu umførini, og teir fara uttan iva at leggja seg eftir fimta sigrinum á rað, áðrenn teir í nevndu raðfylgjuni skulu takast við Neistin, StÍF og Kyndil.

Endaspurturin

Yvirlitið niðanfyri sýnir, hvørjar dystir tey fýra oddaliðini hvør í sínum lagi hava eftir.

	Kyndil	VÍF	Neistin	StÍF
13. mars		KÍF (ú)		
14. mars	H71(ú)		StÍF (h)	Neistin (ú)
20. mars				H71 (h)
21. mars	KÍF (h)	Neistin (h)	VÍF (ú)	
28. mars	Neistin (ú)		Kyndil (h)	
30. mars		StÍF (h)		VÍF (ú)
3. apríl	VÍF (h)	Kyndil (ú)	H71 (ú)	KÍF (h)

HB-málverjin úti

Bárður Johannesen, sum fyri stuttum fekk sín fyrsta skrásetta A-landsdyst, og soleiðis fekk at kalla endaliga góðkenning sum ein av allar bestu málverjunum í føroyskum fótbólti, noyðist nú at halda frí venjingunum í HB í nakrar vikur.

Hósdagin var hann somikið óheppin at traðka skeivt á fótin, og úrslitið gjørdist eitt brot í fótinum.

- Læknarnir siga, at talan er um eitt pent brot, og at steðgurin kanska bara verður tríggjar vikur, men tað eri ikki so vísur í ferð at halda. Men um so er, so havi eg kortini møguleika at gerast klárur, áðrenn landskappingin byrjar, sigur málverjin, sum sjálvsagt iðrar seg um hendingina.

-jm

B36'arar norður-eftir

EB/Streymur er kanska tað fyrstudeildarfelagið í landinum, sum hevur merkt størstu leikarafrágongdina í vetur.

Serliga er tað B36, sum hevur tikið burtur av hópinum, men nú er ferðslan so eisini vend í so máta.

Í øllum førum tykist tað mest sum víst, at komandi árið fara Fróði Clementsen og Carl Herup Høgnesen at spæla við felagsliðinum. Teir eru báðir tveir uppvaksnir í B36, og hava teir eisini í nøkur ár verið í fyrstudeildarhópinum. Men í ár tykjast útlitini hjá teimum báðum fyri spælitíð ikki at vera av teimum allar bestu, og hetta hevur helst vigað tungt, tá avgerðin um flyting er tikin.

Enn eru sáttmálarnir hjá teimum báðum ikki endaliga undirskrivaðir, men sum skilst, so eru tað bert formligu viðurskiftini millum EB/Streym og B36, sum nú eru eftir.

-jm

Stórt tak hjá VB

VÍF kann oyðileggja spenningin í kvinnudeildini, um tær vinna dystin í Vági leygardagin

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Eftir at VB seinasta vikuskifti vann tryggan sigur á Neistanum, er tað hesaferð VÍF, sum er stóra uppgávan hjá VB. Stór, tí eitt tap eftir øllum sólarmerkjum at døma sendir FM-gullið til Klaksvíkar, men eisini tí VÍF framvegis eigur eitt av sterkastu kvinnuliðunum í landinum.

Hóast tað, so eru tær úr Vestmanna einans at finna á triðja plássinum, og tað er einki at ivast í, at hóast sessurin neyvan stendur til at vika, so fara tær at leggja stóra orku í at vísa VB, at støðan burdi verið øðrvísi.

Hetta hevur VB tó ikki ráð at hugsa um. Hjá teimum eru tað stigini, sum telja, og tó at tær kanska kunnu liva við einum javnleiki, so er tað ikki tað, sum tær hava í tonkunum. Har er tað bara sigurin, sum telur, og við eini fullsettari VB-høll í rygginum skuldu útlitini fyri hesum eisini verið hampuliga góð.

Bleytir dystir

Hinir báðir dystirnir í kvinnudeildini mugu uttan iva roknast sum tveir av tí bleytara slagnum.

Á Giljanesi kemur oddaliðið úr Klaksvík á vitjan, og hvussu víkir og vendir, so er einki at ivast í, at tað enn einaferð verður staðfest, hvør styrkismunur er á toppi og botni í kvinnudeildini.

Og í Havn fær Neistin vitjan av StÍF. Tann dystin er Neistin á pappírinum stórfavorittur at vinna, men hinvegin hava tær í fleiri førum havt stórar trupulleikar av niðaru liðunum, so tað kundi kanska hent seg, at tær snáva, nú tær kortini ikki hava meira at spæla fyri.

Mjølnir bara bíðar

Klaksvíkskvinnurnar kunnu gerast meistarar longu hetta vikuskiftið, men tað krevur so, at Dráttur tekur alt við sær úr Trongisvági

FLOGBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Einki er at ivast í, at tey í Klaksvík fara at fylgja væl við, tá TB tekur móti Drátti sunnudagin

Hóast landskappingin enn ikki er liðug, so er lítið at ivast í, at tað verður Mjølnir, sum verður meistari í bestu kvinnudeildini í flogbólti. Seinasta vikuskiftið vunnu tær tryggan 3-0 á Giljanesi, og júst tann dysturin varð frá flestu síðum roknaður sum seinasta forðingin á vegnum móti gullinum. Eisini hóast Mjølnir-kvinnurnar sjálvar halda fast um, at tær enn eiga ein sera truplan útidyst eftir, tá tær í seinasta umfarinum vitja hjá ÍF.

Hesaferð verður talan so neyvan um nakran snávingarstein, tá Fleyr kemur á vitjan. Munurin millum liðini bæði hevur alt árið verið risastórur, og tað skuldi verið løgið, um hann minkaði burtur í einki bara soleiðis uttan víðari.

Og so kundi tað eisini hent seg, at Mjølnir verður meistari um vikuskiftið. At tær liggja somikið væl fyri, sum tær gera, kunnu Mjølnir kvinnurnar fyrst og fremst takka Drátti fyri, eftir at tær á heimavølli vundu burtur úr TB fyri nøkrum vikum síðani.

Nú vitjar Dráttur í Trongisvági, og megna tær enn einaferð at koppa TB, so er meitaraheitið víst hjá Mjølni. Tað er tó einki at ivast í, at TB eisini her fer at royna at fylgja við oddaliðnum, og tær eiga eisini at roknast sum favorittar. Men Dráttur hevur fyrr sýnt, at tær kunnu skapa óvæntað úrslit, og so hava tær eisini eitt tap í steypafinaluni at hevna.

Seinasti dysturin í kvinnudeildini um vikuskiftið verður á Kambsdali, har ÍF tekur ímóti KÍF. Hetta er uttan iva ein dystur, sum ÍF ætlar sær at vinna, og sum úrslitini hava verið seinstu mánaðirnar, er eisini ilt at siggja, hvussu KÍF skal broyta hesar ætlanir nakað.

Toppur og botnur

Hjá monnunum verður bert tann eini dysturin leiktur um vikuskiftið. Hetta er í Klaksvík, har oddaliðið, Mjølnir, tekur ímóti botnliðnum, Fleyr. Her er einki at ivast í, at stigatalvan endurspeglar styrkismunin, sum er millum liðini, og tí er einki at ivast í, at stigini verða eftir í Klaksvík leygardagin.

Málverjastyrkur

Ætlaði álopsstyrkurin verður av ongum, men hósdagin kom nýggjur málverji kom til felagið hósdagin

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Tað hevur leingi ljóðað, at B36 í ár skuldi hava tilgongd av einum brasilskum álopsleikara, sum seinastu árini hevur roynt seg í íslendskum fótbólti.

Nú er tó líkt til, at hesin styrkur verður av ongum. Kristian á Neystabø, formaður í B36, váttar, at álopsleikarin helst tekur eitt ár afturat í Íslandi. Ikki minst tí hann hevur fingið at vita, at hann við einum fimta ári í Íslandi kann fáa íslendskt pass.

Hinvegin hevur B36 nú aftur ætlanir um at styrkja seg á málverjasessinum. Eftir at danski Henrik Bødker varð vigaður og funnin ov lættur, varð annars roknað við, at Tróndur Vatnhamar sat tryggur á hesum sessinum, men nú tykist hann kortini fáa kapping.

Talan er um ein 25 ára gamlan litaviskan málverja, sum áður hevur leikt á høgum støði í Russlandi. Komandi tíðina skulu bæði hann og felagið kunna seg um hvønn annan, áðrenn støða verður tikin til, hvørt talan verður um sáttmála ella ikki.

Dystir um vikuskiftið

Hondbóltur

1. deild kvinnur

Dagf.	Kl.	Dystur	Dómarar
13.03	14.30	VB-VÍF	Geir Wardum & Gunnar Gregoriussen
13.03	15.00	Søljan-Stjørnan	Kristian Johansen & Sámal Hansen
14.03	14.30	Neistin-StÍF	Karsten Joensen & Kristian Joensen

Menn

13.03	16.00	KÍF-VÍF	Hannis Wardum & Uni Wardum
14.03	16.00	Neistin-StÍF	Karsten Joensen & Kristian Joensen
14.03	16.00	H71-Kyndil	Kristian Johansen & Sámal Johansen

Flogbóltur

Meistaradeild kvinnur

13.03	14.00	Mjølnir-Fleyr	TB
14.03	14.00	ÍF-KÍF	Mjølnir
14.03	15.00	TB-Dráttur	Tummas Óli Mortensen & Jan Hentze

Meistaradeild menn

13.03	16.00	Mjølnir-Fleyr	SÍ

Hondbóltsstøður

1. Deild kvinnur

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1	Stjørnan	9	8 - 0 - 1	578	421	157	27
2	VB	8	8 - 0 - 0	558	414	144	24
3	VÍF	8	5 - 0 - 3	517	426	91	19
4	Neistin	7	3 - 0 - 4	474	445	29	14
5	StÍF	9	2 - 0 - 7	483	564	-81	9
6	Søljan	8	2 - 0 - 6	383	498	-115	6
7	Kyndil	9	1 - 0 - 8	344	569	-225	3

1. Deild menn

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1	Kyndil	6	3 - 1 - 2	481	449	32	16
2	VÍF	6	4 - 0 - 2	449	402	47	14
3	Neistin	6	4 - 0 - 2	459	428	31	14
4	StÍF	6	3 - 0 - 3	413	390	23	13
5	KÍF	6	2 - 0 - 4	428	492	-64	7
6	H71	6	1 - 1 - 4	396	465	-69	5

Flogbóltsstøður

Meistaradeild, kvinnur

		d	v	-	t	v sett	t sett	+/- sett	stig
1	Mjølnir	18	15	-	3	48	16	32	22
2	TB	18	14	-	4	47	15	32	20
3	Dráttur	18	10	-	8	37	29	8	16
4	ÍF	18	7	-	11	25	36	-11	10
5	KÍF	18	7	-	11	25	44	-19	9
6	Fleyr	18	1	-	17	11	53	-42	1

Meistaradeild, menn

		d	v	-	t	v sett	t sett	+/- sett	stig
1	ÍF	14	12	-	2	38	9	29	17
2	Mjølnir	14	13	-	1	39	9	30	19
3	SÍ	15	7	-	8	27	27	0	10
4	Fram	14	2	-	12	10	37	-27	2
5	Fleyr	13	1	-	12	5	37	-32	2